Nú fáa vágbingar skattalætta

T‡skvøldi› gjørdi Vágs B‡rá› av at lækka kommunuskattin. Men andstø›an í b‡rá›num var ímóti. Hon vil heldur hava peningin til at byggja havnina út fyri, og til barnagar›

KOMMUNUSKATTUR
Áki Bertholdsen

Nú skal kommunuskatturin í Vági lækkast.

Á b‡rá›sfundi t‡skvøldi› samtykti ein meiriluti av Vágs B‡rá› at lækka kommunuskattin 1,25% næsta ár.

Vàgs Kommuna hevur annars veri› sera illa fyri fíggjarliga, so í nógv ár hevur skattaprosenti› í Vági veri› 23%, sum er ta› mest loyvda.

Men hesi seinastu árini er ta› gingi› nógv framá í Vági og fíggjarstø›an er batna› ár undan ári.

Og nú helt b‡rá›i› sostatt, at tí›in var búgvin til at lækka skattaprosenti› ni›ur í 21,75 %.

Barnafrádrátturin er 2.500 krónur í ár og hann ver›ur óbroyttur næsta ár.

Kommunan ásetur ikki longur kirkjusakttin, tí hann ver›ur nú tikin saman vi› landsskattinum. Sostatt ásetir kommunan ikki longur kirkjuskatt.

Heldur barnagar› og havn enn lægri skatt

Ta› var einans samgongan í Vágs B‡rá›, sum atkvøddi fyri skattalækkingini.

Hinvegin vóru teir bá›ir í uttanflokkalistanum, sum er í andstø›u, ímóti at lækka skattaprosenti›.

Teir bá›ir, Poul Johannus Joensen og Sølvi Andreasen, mæltu til at skattaprosenti› uppá 23% var› var›veitt.

Teir mæla heldur til at brúka peningin til at útbyggja Vágs Havn fyri og til at gera barnagar› fyri.

Teir vístu á, at vinnulívsmenn í Vági høvdu gjørt vart vi›, at teir høvdu brúk fyri djúpari havn, enn tann, sum nú er í Vági.

Teir hildu eisini, at tí›in er farin frá dagrøktarskipanini og at Kommunan átti at fara undir at byggja barnagar› ísta›in.Teirra uppskot var, at tá i› tr‡ ár vóru farin, skuldi kommunan hava mennandi barnagar›s og frítí›artilbo› til øll børn ímillum _ og 8 ár.

Eftir at hava hvat hægst loyvda skattaprosent í fimm ár, fáa vágbingar skattalætta komandi ár

Teir søgdu, at hvørt prosent, sum skatturin lækkar, gevur kommununi ikki meiri enn 1.270.000 krónur.

Og teir vóru eisini grei›ir yvir, at hetta muna›i ikki nógv, men teir hildu, at hetta kundi vera ein byrjan. Og tí mæltu teir eisini til, at kommunan tók stig til at fíggja havnaútbygging.

Teir hildu, at tær 1.270-.000 krónurnar, sum vágbingar komu at spara í skatti um ári›, var líti› aftur ímóti teirri meirinntøku, teir kundu fingi›, um umstø›urnar hjá vinnulívinum batna›u, so at ta› bleiv meiri arbei›i.

Og teir hildu eisini, at ein trygg barnaansingarskipan var ein avger›andi fortreyt fyri at fáa fólk at stø›ast í Vági og kanska at flyta aftur til Vágs.

Skatturin avger›andi

Men teir bá›ir komu ongan veg vi› sínum broytingaruppskoti, tí hinir sjey b‡rá›slimirnir feldu ta› og samtyktu ísta›in at lækka skattin.

Jógvan Krosslá, b‡rá›sforma›ur, vísti á, at skuldi kommunan fara undir barnagar›ar nú, og kunna nøkta allan tørvin í 2003, so mátti allar a›rar ætlanir sleppast. Og hann helt, at ta› var lívsney›ugt at lækka skattin.

Dánjal Bjarkhamar helt at skuldi fólk stø›ast í bygdini og kanska flyta aftur, var ta› júst avger›andi, at skatturin var› lækka›ur.

Páll Augustinussen vísti á, at kommunan skylda›i so nógv nú, at hon fekk ikki loyvi til at taka lán.

Byggja út fyri 2, 8 milliónir

VÁGS KOMMUNA
Áki Bertholdsen

Næsta ár skal ætlar Vágs B‡rá› at byggja út í kommununi fyri gó›ar 2,8 milliónir. Hetta er eitt sindur minni enn í ár, tí í ár er bygt út fyri 3,3 milliónir í Vági

Á b‡rá›sfundi t‡skvøldi› var› fíggjarætlanin samtykt og hon javnvigar vi› 32,6 milliónum. Hetta er eitt sindur meiri enn fíggjarlógin í ár, sum javnviga›i vi› 29,8 milliónum.

Sum nevnt a›rasta›ni, ver›ur skatturin lækka›ur úr 23 %, ni›ur í 21,75%

12 milliónir í avdráttum

Annars skal Vágs kommuna næsta ár betala 7,2 milliónir í avdráttum og 4,8 milliónir í rentum, ella tilsamans 12 milliónir.

Hetta er væl meiri enn kommunan hevur betalt í ár. Í ár hevur kommunan goldi› 4,2 milliónir í avdráttum og 3,4 milliónir í rentum, ella tilsamans 7,6 milliónir.

Sostatt skal kommunan gjalda 4,4 milliónir meiri í rentum og avdráttum komandi ár, enn hon hevur gjørt í ár.

Men ta› er eftir teirri n‡ggju avtaluni um kommunuskuldina, at kommunan skal betala so nógv. Eftir avtaluni skal kommuna tey næstu fimm árini betala 10% av skuldini hvørt ár í avdráttum. Tá i› tey fimm árini eru farin, er kommunan komin heilt uppundan, tí tá er skuldin komin ni›ur á 45 milliónir og ta› er ikki meir enn ein gó› álíkning. Næsta ár fer kommunan um 32 milliónir inn í skatti. Í løtuni skyldar kommunan 72 milliónir.

Veg til eldrasamb‡li

At so nógv skal betalast í rentum og avdráttum, hevur gjørt, at eitt sindur má sparast í rakstrinum, hóast inntøkan er hægri.

Men ta› hjálpir, at av tí, at kommunan yvirtekur barnaansingina, og landi› afturfyri yvirtekur eldrøki›, sparir kommunan álei› eina hálva millión.

Umframt tær útbyggingar, sum greitt er frá a›rasta›ni, ætlar b‡rá›i› eisini at gera veg til Eldrasamb‡li›. B‡rá›i› hevur sett 550-.000 krónur av til endamáli› á fíggjarætlanini fyri 2001. Ætlanin er at gera veg frá Eldrasamb‡linum, oman í høvu›svegin ni›ri á Marknoyri.

Somulei›is skulu 300-.000 krónur brúkast til n‡ggja luftskiftisskipan í skúlanum, tí ta› er kravt. Eisini eru 900.000 krónur settar av til n‡tt reinsiverk, og kirkjugar›urin skal byggjast út fyri 400.000 krónur.

Annars kann kommunan byggja út fyri einar fimm milliónir, eftir karmunum, sum fíggjarmálast‡ri› hevur sett upp.

Fara at gera lyft í Heilsumi›stø›ina

RØRSLUTARNA‹
Áki Bertholdsen

Nú skal lyft gerast í Heilsumi›stø›ina í Vági.

Ta› er ein íløga, sum Vágs B‡rá› nú hevur samtykt at byrja uppá næsta ár.

Í fíggjarætlanini fyri komandi ár, sum var› samtykt á b‡rá›sfundi t‡skvøldi›, stendur, at 40.000 krónur skulu setast av til eina lyft í Heilsumi›stø›ini.

Heilsumi›stø›in er í tveimum hæddum, har kommunulæknin er í ne›ra og tannlæknin í erva. Og í løtuni eru bara trappur upp á loft, og ta› ger ta› ómetaliga tvørligt hjá rørslutarna›um at sleppa til tannlækna.

Gera ste›gipláss til bussar í Vági

FER‹SLUTRYGD
Áki Bertholdsen

Nú er ætlanin at gera eitt ste›gipláss til bussar vi› skúlarnar í Vági.

Bæ›i kommunuskúlin og Mi›námsskúlin liggja li› um li›, men parkeringsvi›urskiftini eru sera vánalig. Ikki minst er ta› sera skubbut hjá teimum, sum koyra í og úr skúla vi› bussi. Ta› er so trongligt, at ta› er mangan ru›uleiki, og ta› ver›ur mett, at ta› er ikki heilt vandaleyst at hava so vánaligar umstø›ur tá i› vánalanæmingar skulu í og úr skúla.

Vágs B‡rá› hevur í fleiri ár tosa› um at gera eitt ordiligt ste›gipláss til bussar vi› skúlarnar, men ta› er ongantí› komi› longri.

Men nú ætlar b‡rá›i› at naka› skal henda.

Á fíggjarætlanini fyri komandi ár hevur b‡rá›i› samtykt at seta 150.000 krónur av til eitt ste›gipláss vi› skúlarnar til bussar.

Ætlanin er at gera ste›gipláss› á stykkinum ni›anfyri gomlu kommunuskrivstovuna og Mi›námsskúlan.

Ein trupulleiki hjá kommununi hevur veri›, at ta› er landi›, sum eigur stykki› undir Mi›námsskúlanum.B‡rá›i› hevur søkt fyri tveimum árum sí›ani um at fáa loyvi at gera ste›gipláss har, men hevur ikki fingi› svar frá landsumsitingini. Men nú ver›ur so roynt aftur.

Havnin eitt rættiligt skattaskjól

Skattaprosenti› í Havn er nú lækka› úr 19 prosentum ni›ur í 18,75 prosent. Hetta var› samtykt á felags fundi millum Tórshavnarn b‡rá› og Kollafjar›ar bygdará›. Fíggjarætlanin fyri Tórshavnar Kommunu er nú endaliga avgreidd. Jan Christiansen leg› i vegna Fólkaflokkin broytingaruppskot fram, sum skuldi lækka skattaprosenti › ni›ur til 18,5, men ta› vann ikki frama

FÍGGJARÆTLAN
Stefan í Skorini

Havnin er vi› at gerast eitt rættiligt skattaskjól samanbera vit vi› skattatr‡sti› í teimum mest skuldarbundnu kommununum í Føroyum, har kommunuskatturin er upp móti 23 prosentum.

Tú sleppur umlei› 4 prosent biligari í kommunuskatti, um tú b‡rt í Tórshavn.

Á felagsfundi 14. november samtyktu Tórshavnar b‡rá› og Kollafjar›ar bygdará› fíggjarætlan fyri 2001. Størsta broytingin er, at skattaprosenti› lækkar úr 19% ni›ur í 18,75%. Fíggjarætlanin fyri næsta ár er sostatt endaliga samtykt í b‡rá›num.

Fíggjarætlanin javnvigar í ár vi› 380 milliónir krónur sammett vi› 338 milliónir krónur í fjør. Ein av orsøkunum til øktu javnvágina er, at Tórshavnar og Kollafjar›ar kommuna leggja saman 1. januar næsta ár.

Fólkaflokkurin í b‡rá›num gjørdi eina roynd at lækka skattaprosenti› enn mera, ni›ur í 18,5%. Hetta skuldi gerast vi› at skava 5 milliónir krónur av verandi fíggjarætlan, sum javnvigar vi› 380 milliónir. Hetta uppskoti› vann ikki frama, og tí ver›ur skattaprosenti› 18,75 næsta ár.

Ein av orsøkunum, til at skattaprosenti› lækkar, er, at íbúgvar í Kollafir›i hava goldi› 18,5% í komm-unuskatti, me›an havnarbúgvar hava goldi› 19%. Fyri at samanleggingin ikki skuldi kennast serliga tung fyri Kollafjør›, møttust rá›ini í mi›juni, og skattaprosenti› var› sett til 18,75.

Størsta játtanin er til barnaansing

Størsta einstaka útrei›slan hjá kommununi næsta ár er barnaansingin. Henda játtanin er økt úr 66,8 milliónum í ár til 81,4 milliónir næsta ár. Foreldur at smábørnum hava lagt tr‡st á b‡rá›i› um at loysa trupulleikan vi› teimum mongu børnunum, sum ikki fáa ansingarpláss, og ta› er líkt til, at okkurt hendir nú.

Havnabúgvar skulu næsta ár gjalda 18,75% í kommunuskatti næsta ár sammett vi› 19% í ár

Rakstrar- og íløguútrei›slurnar næsta ár hækka úr 215 upp í slakar 270 milliónir krónur. Orsøkin til hækkingina er, at íløgujáttanin er hækka› vi› 18 milliónum og rakstrarútrei›slurnar hækka somulei›is vi› 18 milliónum, nú Kollafjør›ur og Havnin leggja saman.

Játtanin til tekniskar veitingar er 72,4 mió., skúlamál 37,2 mió., fyristing 28,1 mió., mentan og umhvørvi 15,6 mió. og sosial- og heilsumál 13,5 mió. krónur. Kommunan fer næsta ár at gjalda slakar 40 milliónir krónur í lánsgjøldum.

Kommunan hevur eisini ein framtí›argrunn, og har eru settar 5 milliónir. Hesin grunnur hevur til endamáls at skapa stabilitet og at kunna seta útsettar íløgur í verk. Hetta ver›ur gjørt tá javnvág aftur er innan byggivinnuna, og tá Føroya landsst‡ri loyvir kommunum at økja íløguvirksemi.

Eisini samtyktu Tórshavnar b‡rá› og Kollafjar›ar bygdará› at mótmæla, at Føroya løgting ger t‡›andi lógarbroytingar í útrei›slub‡tinum millum land og kommunur. Eisini ver›ur mótmælt, at skattalættar ver›a samtyktir, sum hava stóra ávirkan á kommunalu inntøkuna, uttan at hetta fyrst er lagt fyri kommununar til ummælis, og hetta ver›ur gjørt, eftir at kommunala fíggjarætlanin er samtykt.

Á felags fundinum var› fíggjarætlanin fyri Tórshavnar havn eisini einmælt samtykt.

VI‹MERKING

Allir vegir føra til fullveldi

- um føroyingar sjálvir áseta fer›aætlanina og henda ver›ur fylgd

Aftaná 4. samrá›ingarumfar gjørdist ta›, i› kundi hómast longu aftaná 1. samrá›ingarfund, púra greitt, nevnliga at Føroya Landsst‡ri ikki skuldi vænta sær danskan stu›ul í ætlan síni at fáa Føroyum fullveldi.

Vi› hesum í huga átti fullveldisætlanin nú at veri› løgd.

Føroysk fyriskipan av fullveldisætlan

Ta› átti sostatt at veri› klárt, at føroyingar nú sjálvir skulu fyriskipa eina fullveldisætlan og harvi› at ríkisstu›ulin skal ni›urtrappast og málsøki yvirtakast av føroyingum uttan stórvegis avtalur vi› danir. Tí ta› er sera líti› sannlíkt – aftaná 7 mána›ars sokalla›ar samrá›ingar – at danska stjórnin fer at vísa áhuga fyri at gera avtalu, i› beinlei›is lei›ir móti føroyskum fullveldi og bindur komandi landsst‡ri›.

Danska stjórnin fer helst at vísa á, at vi›víkjandi ríkisstu›linum, so ver›ur samrátt um henda vi› jøvnum millumbilum, og at føroyska landsst‡ri› bert kann ynskja at fáa minni ríkisstu›ul til hesar samrá›ingar. Tá i› ta› kemur til yvirtøku av málsøkjum, heimilar heimast‡rislógin Føroya Landst‡ri at yvirtaka flestu málsøkini. Danska stjórnin fer helst at vísa á, at hon er klár til at samrá›ast um yvirtøku av seinastu málsøkjunum, tá i› heimast‡rislógin er n‡tt til fulnar.

Danska stjórnin hevur meira ella minni longu gjørt klárt, hvørji sjónarmi› hon hevur og fyri at tryggja sær, at ta› ikki enn einafer› ver›ur danska stjórnin, i› eigur avger›andi or›i›, átti føroyingar nú fyrireika seg til sjálvir at taka fullveldi.

Gerast óheft av ríkisstu›linum

Vi›víkjandi ríkisstu›linum (blokkinum) kundi føroyski búskapurin gjørst óheftur av hesum vi› eitt nú, at lati› ein prosentpart av blokkinum í ein grunn á hvørjum ári›. Tá i› yvirskoti› á fíggjarætlanini nú er relativt stórt, kundi byrja› veri› vi› eitt nú at lati› 30% av blokkinum í grunn í 2001, 40% í grunn árið 2002, 50 % í grunn 2003 – soleiðis at 100% av blokkinum var latin í grunnin ár 2008. Uppsparingin kundi veri› skipa› á nógvar ymiskar hættir, og møguleiki hev›i soleiðis veri› fyri stigvísari uppsparing av blokkinum alt eftir hvørja skiftistí› ein ynskti.

Helst vil ein tílík skipan tó bera í sær, at danska stjórnin ver›ur tr‡st til – serstakliga frá danskari sí›u – at minka blokkin til Føroyar. Uttan mun til um blokkurin var› uppspardur ella danska stjórnin gekk vi› til at minka blokkin, so var› komi› nærri føroyska málinum, nevnliga at gerast óheft av blokkinum.

Ríkisstu›ulin hava vit sostatt ríkar møguleikar fyri at gerast óheft av, enntá á ein hátt, i› ikki krevur avtalu vi› donsku stjórnina, og á ein hátt, i› vi›førir eina skynsama skiftisskipan.

Yvirtøka av málsøkjum

Eisini eru enn málsøki, i› ikki eru á føroyskum hondum, og skulu hesi yvirtakast umsitingarliga eins væl og búskaparliga. Stø›an hesum vi›víkjandi er tann, at stutt er eftir á mál, á›renn Føroyar kunnu yvirtaka ta› í eftir er. Landsst‡ri› kann gera eina ætlan fyri, hvussu og nær ymisku málsøkini skulu yvirtakast, og so er bert at yvirtaka so hvørt sum ein er umsitingarliga førur fyri at yvirtaka málsøkini. Ver›a st‡rini sett í verk at fyrireika yvirtøkurnar, sambært eini tílíkari ætlan, er verkætlanin sostatt sett í verk og er ta› sí›an væntandi bert spurningur um tí›, á›renn Føroyar umsitingarliga ver›a førar fyri at yvirtaka seinastu málsøkini. Búskaparliga krevja yvirtøkurnar eisini nakrar krónur, men vi› skilagó›ari fyriskipan fer hetta ikki at ver›a nøkur for›ing.

Løgtingsvali› nærkast

Løgtingsvali› nærkast í hvørjum og ivast mong sjálvsagt í, um komandi landsst‡rini nú eisini fara at fullføra eina slíka ætlan vi›víkjandi ríkisstu›linum og yvirtøku av málsøkjum. Til ta› kann ver›a sagt, at búskaparfrø›ingar stórtsæ› eru samdir um, at ta› er til frama fyri føroyska búskapin at gerast óheftur av ríkisstu›linum og yvirtøku av seinastu málsøkjunum eru flest allir føroyingar áhuga›ir í. Hartil kemur at allir flokkar hava sagt seg vera áhuga›ar í, at Føroyar skulu gerast búskaparliga sjálvstø›ugar, og tískil má væntast at ein stigvís uppsparing av blokkinum eins og yvirtøka av flestu málsøkjum áttu at fingi› brei›a politiska undirtøku.

Um ta› ikki skuldi vísst seg at veri› politiskur vilji til at fullføra eina slíka ætlan hóast alt, má spurningur setast vi›, um politiska stjórnin er nóg búgvin til at stjórna tjó›veldinum Føroyar.

T‡›andi at velja rætta vegin

Samanumtiki› kann sigast, at stø›an er tann, at ta› er líti› sannlíkt at danska stjórnin fer at eftirlíka nakrari ætlan hjá Føroya Landsst‡ri, i› lei›ir móti fullveldinum og bindur komandi landsst‡ri› og sjálvt um ta› skuldi› hent, at stjórnin eftirlíka›i eini tílíkari ætlan, kann komandi landsst‡ri› broyta hesa avtalu um ta› ynskir hetta.

Um fari› ver›ur fram á skynsaman hátt, soleiðis at føroyska fólki› kennur seg trygt vi› fullveldisætlanina, er stórur meiriluti í føroyska fólkinum fyri at Føroyar gerast eitt tjó›veldi. Føroyar átti tískil nú sjálvar at fyrireika seg til at gerast eitt tjó›veldi, uttan fleiri avtalur vi› Danmark enn ney›ugt er, tí uttan mun til avtalu ella ikki, so er og ver›ur ta› ein spurningur um føroyska politiska viljan komandi árini til at fullføra fullveldisætlanina, i› ver›ur avgerandi.

Føroyskt fullveldi er nú sett ovarliga á politisku dagsskránna og har er ta› komi› fyri at ver›a, men hóast stórtsæ› allir vegir nú føra til fullveldi, so má ásannast at ta› eru ávísir vegir, i› føroyingar fáa størri ávirkan á og eru tryggari og skjótari enn a›rir.

Roynt hevur veri› at koyrt tann vegin, i› Danmark og Føroyar n‡ta í felagsskapi, men hetta vísti seg at ver›a ein einvegis motorvegur fyri Danmark, me›an ta› fyri Føroyar var ein blindur vegur. Hesufer› ræ›ur um at velja rætta vegin, tí um skeivt ver›ur valt, kann ta› krevja stóran umveg og taka drúgva tí›, at koma aftur á røttu lei›ina. Nú ræ›ur tískil um, at velja tann vegin har Føroyar sjálvar áseta fer›aætlanina og harvi› sjálvar áseta bæ›i í trygdarkrøvini og fer›ina. Ta› er hesin vegur, i› skjótast, tryggast og á mest hei›urligan hátt lei›ir okkum til føroyskt fullveldi.

Kristina Háfoss